# Veitarasáttmáli

**Akstovuna (Kundin)**

**og**

**xxxxxx, v-tal xxxxxxx (Veitarin)**

| | |
|---|---|
| Grundarlag | Sáttmálin fevnir um uppgávur knýttar at ráðgeving, menning og raksturi av Oracle APEX (Meginskipanini) hjá kundanum- Sáttmálin er saman við útbjóðingartilfarinum grundarlagið undir samstarvinum. |
| Uppgávur hjá veitaranum (veitingin) | Talan er um at menning innan Oracle APEX umhvørvið hjá kundanum, ið er nágreinilig lýst í útbjóðingartilfarinum. |
| Arbeiðstíð og staður | Uppgávurnar skulu loysast í vanligari arbeiðstíð, um ikki annað verður avtalað.<br>Møguligt skal vera at fáa fatur í veitaranum umvegis telefon og teldupost í vanligari arbeiðstíð. Og í serligum førum, tá talan er um kritiskar støður. |
| Góðska | Tað verður væntað, at veitarin loysir uppgávurnar á einum stigi, sum roknað kann verða við frá einum veitara við tí bakgrund, útbúgving og royndum, ið veitarin hevur, sambært tilboðnum. |
| Tímatakstur | Ráðgevin verður løntur fyri sítt arbeiði sambært tilboðnum. |
| Tíðarnýtsla og aktivitetir | Veitarin skrásetur dagliga tímanýtslu og førir sokallaða logbók fyri høvuðsvirksemi.<br>Veitarin ger tímanýtslu upp hvønn mánað og sendir kundanum hana, saman við logbók.<br>Veitari og kundi gjøgnumganga og góðkenna tímanýtslu og logbók. |
| Rokningar | Veitarin sendir kundanum rokning eina ferð um mánaðin, har skjalfesting fyri tímar í tíðarskeiðinum er hjáløgd.<br>Treytin fyri útgjaldi er, at krøvini til skráseting av tíðarnýtslu eru lokin.<br>Rokningin skal verða talgild í vanligum oio-xml formati. |

Uppskot

| | |
|---|---|
| Trúnaður | Báðir partar hava skyldu at viðgera vitan og tilfar um hvønn annan í trúnaði.<br>Tó er kundin fevndur av “Løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina” |
| Skyldur hjá kunda | Kundin hevur skyldu at tryggja, at leiðsla og starvsfólk við hóskandi førleika veita hjálp, so veitarin kann loysa tær uppgávur, viðkomandi er settur at loysa.<br>Kundin hevur ábyrgd av at kunna viðkomandi partar og persónar um leiklutin hjá veitaranum, og tær uppgávur, sum avtala er gjørd um. |
| Rættindi til tað útinta | Kundin fær øll rættindi til tað, sum er útint av veitaranum í sambandi við henda sáttmála, umframt øll rættindi til at broyta, geva og menna víðari tað útinta, soleiðis sum kundin ynskir tað.<br>Tilfar, sum kundin hevur útflýggjað veitaranum, verður latið aftur, í seinasta lagi, tá ið sáttmálin fer úr gildi.<br>Kundin góðtekur, at veitarin kann varðveita upplýsingar og vitan, sum veitarin nýtir at menna egið virksemi, tó soleiðis at hetta ikki brýtur avtaluna um rættindi og trúnað. |
| At siga sáttmálan upp | Sáttmálin kann sigast upp av báðum pørtum við skrivligari freist á 3 mánaðir. |
| Mishald | Við týðandi mishald av hesum sáttmála, kann sáttmálin slítast.<br>Dømi um týðandi mishald eru um veitarin:<br>- Ikki maktar uppgávurnar<br>- Ikki veitir góðsku sambært tilboðnum<br>- Ikki heldur avtalur |
| Force majeure | Vanligar reglur um force majeure eru galdandi fyri henda sáttmála. |
| Ósemjur | Tekur ósemja seg upp ímillum partarnar, sum ikki ber til at loysa beinanvegin, skal boðast til samráðingar millum stjórarnar hjá pørtunum.<br>Fæst eingin loysn í sátt og semju, verður trætan loyst við vanligum rættarmáli. Føroyskur rættur er galdandi. |
| Gildistíð | Sáttmálin kemur í gildi við undirskrift av báðum pørtum og og byrjar 1. apríl 2026. |
| Uppathald | Við uppathald av sáttmála skal veitarin handa kundanum alt kundin eigur rættindi til. |

Uppskot

AKSTOVAN

Akstovan | Hoyvíksvegur 57 | Postsmoga 3206 | FO-110 Tórshavn
Tel +298 35 04 00 | Fax +298 35 04 01 | www.akstovan.fo | akstovan@akstovan.fo

| | |
|---|---|
| Undirskrift | Fyri kundan<br><br>Dagfesting:<br><br>Navn:<br><br>Undirskrift: ______________________________<br><br><br>Fyri veitaran<br><br>Dagfesting:<br><br>Navn:<br><br>Undirskrift: ______________________________ |

Uppskot